JARÐFEINGI
Faroese Geological Survey

Til Umhvørvismálaráðið

umhvorvi@umhvorvi.fo

Tórshavn, 20. oktober 2025

Journal nr: 25/00080

Viðgjørt: lm

Tygara skriv: J.nr 23/01930-22

Hoyringarsvar frá Jarðfeingi til uppskotið til løgtingslóg um veðurlagslóg

Vit taka undir uppskotinum og endamálsorðingini til løgtingslóg um veðurlagslóg. Vit meta tó, at lógaruppskotið í støðum er óítøkiligt og lítið sigandi, og vit hava viðmerkingar og uppskot, sum vit meta kunnu styrkja lógaruppskotið.

Ov lang tíð millum frágreiðingar

Í §2 verður sagt, at útlátið av vakstrarhúsgassi frá føroyskum løgdømi skal vera netto null í 2050, og í næstu paragraff verður sagt, at virkisætlanir verða gjørdar fimta hvørt ár. Málið er gott og høgt at seta, samstundis sum vit býta merki í, at eingi deilmál verða sett fyri tíðina fram til 2050.

Afturat hesum sakna vit, at §3 ítøkiliga krevur, at statusfrágreiðingar, sum í minsta lagi eiga at gerast eina ferð um árið. Ein árlig almenn frágreiðing kann taka saman um og meta um átøkini: tey farnu, tey virknu og tey, sum eru ávegis. Ein slík árlig og almenn frágreiðing hevur møguleika at vekja ans millum politikarar og fólk sum heild og vera við til at skapa tilvitan og kjak um virksemið kring veðurlagslógina. Um Føroyar skulu røkka høga málinum í 2050, sum lógin ásetir, er neyðugt at núverandi politikarar ikki leggja uppgávuna á framtíðarpolitikarar, men sjálvir taka ábyrgd, so føroyska samfelagið á ein skilagóðan hátt røkkur netto nullútláti av vakstrarhúsgassi um 25 ár á ein hátt, so orkan er rein, bílig og varandi. Tað hevur tí alstóran týdning, at vit øll fáa kunning javnan, so virksemið kring veðurlagslógina verður sjónligt millum fólk, t.d. við eini árligari frágreiðing.

§4 ásetir, at landsstýrisfólkið í veðurlagsmálum samskipar arbeiðið at røkka veðurlagsmálunum og ráðførir seg við fólk, serstakliga í sambandi við nýggjar 10 ára virkisætlanir, sum koma fimta hvørt ár. Ein kann óttast, at nógv virksemi er júst fimta hvørt ár, meðan kvirra valdar millum politikarar um veðurlagslógina í tíðini millum virkisætlanir. Tær árligu statusfrágreiðingarnar um arbeiðið undir veðurlagslógini kundu hildið javnan fløva í evninum, og slíkar ásetingar eiga at verða nevndar beinleiðis í lógini.

Tilmæli 1: Krav um árligar frágreiðingar eigur at vera bindandi og verða nevnt í lógini.

Tilmæli 2: Veðurlagslógin eigur at nevna deilmál fram til 2050

Málið við veðurlagslógini: netto nullútlát PLUSS bílig orka í 2050

Málið við veðurlagslógini er, at útlátið av vakstrarhúsgassi frá virksemi undir føroyskum løgdømi á landi og sjógvi í 2050 skal vera netto null. Hvat um samlaða samansetingin av orku, sum vit tá fáa, verður dupult so dýr sum í dag? Tá hava vit minkað livistøðið hjá okkara børnum og teirra børnum. Vit halda, at veðurlagslógin eigur at taka hesa avbjóðing við inn í heildarmyndina og seta sum mál at framleiða orku bíligt, so orkukostnaður er bíligari enn í dag, til dømis við bíligari orkuframleiðslu og effektivari orkubrúki.

Tilmæli 3: Veðurlagslógin eigur at seta málið, at kostnaður fyri orku skal lækka.

Nýggja veðurlagslógin gevur ongar heimildir til amboð

Einki verður nevnt í nýggju veðurlagslógini um heimildir til at seta í verk kunngerðir, sum kunnu gerast amboð til dømis til at leggja gjøld ella avtaka gjøld, sum eggja til at røkka málunum í lógini.

Tilmæli 4: Veðurlagslógin eigur at nevna heimild til at seta í verk kunngerðir.

Veðurlagsráðið

§5 ásetir, at óheft Veðurlagsráð við trimum serfrøðingum skal stovnast. Fróðskaparsetrið skal útnevna limirnar í Veðurlagsráðnum. Hetta er gott, tí tað kann tryggja armslongd til politisku skipanina. Veðurlagsráðið fær eina krevjandi uppgávu sum óheftur ráðgevi hjá landsstýrinum, tí neyðugt verður við serfrøði og góðum innliti í eini røð av viðurskiftum:

1. **Serfrøði innan náttúruvísindi**, m.a. veðurlag, veðurlagsbroytingar, útlát av veðurlagsgassum, umhvørvi, økologi, landslagsbroytingar, havfrøði og marina økologi.

   Føroyska lendið er nógva staðni illa farið og hevur mestsum ongan plantuvøkstur, samstundis sum stórir partar av føroyskum vátlendum eru drenað og turrløgd, so uppsamling av lívrunnum tilfari er steðgað. Øktur plantuvøkstur á støðum við svarðloysi og verja av vátlendum kann vera við til at upptaka CO_2 úr atmosferuni.

   CO_2-goymsla í føroyskum basalti kann eins og í Íslandi gerast ein virðismikil uppsavning av CO_2 úr atmosferuni. Føroyar eiga í dag serfrøði innan hetta økið.

   Havbotnurin hevur summastaðni serligar førleikar til at uppsavna vakstrarhúsgass. Noreg hevur nýliga kortlagt rennur á havbotninum í eitt nú Norsku Rennuni, Skagerak og Norðsjónum, sum árliga uppsavna lívrunnin sedimentir í ovastu 10 sentimetrunum. Norsku tølini higartil vísa, at rennurnar savna ovurstórar nøgdir av

CO_2, sum kunnu mineraliserast og goymast í langa langa tíð, um tilfarið fær frið. Tá tilfarið á havbotninum verður órógvað av t.d. botntroling, verða ovurstórar nøgdir av CO_2 sleptar út í sjógvin og enda uppi í atmosferuna. Líknandi rennur, sum uppsavna stórar nøgdir av lívrunnum sedimentum, finnast væntandi á føroyskum sjóøki. Kortlegging, sum kann veita vitan um slík viðurskifti á føroyskum havbotni, hevur týdning fyri CO_2-roknskapin og hoyrir heima í tilvitinum um føroyska árinið á útlát av vakstrarhúsgassi.

2. **Serfrøði innan fiskiskap, landbúnað og matframleiðslu**, sum kann fáast hjá fiskifrøðingum og landbúnaðarfrøðingum, eftirsum hesir geirar hava stórt útlát av veðurlagsgassum og tola illa veðurlagsbroytingar.

3. **Serfrøði innan matvørutøkni** fyri at finna loysnir, sum effektivisera lokala matframleiðslu.

4. **Serfrøði innan orku og tøkni** sum til dømis innan elnet, varandi orku, orkugoymslu, effektivisering, infrakervi og grøna orkuskiftið, orkusparandi bygging og burðardyggum byggiætlanum. Veðurlagslógin ásetir, at útlátið av vaktrarhúsgassi (sum umfatar m.a. CO_2, CH_4, N_2O og F-gass) á landi og sjógvi skal vera netto null í 2050. Netto nullútlát leggur upp til, at nýggj tøkni skal mennast og takast í nýtslu, - tøkni, sum minkar um útlát av vakstrarhúsgassi og tøkni, sum upptekur vakstrarhúsgass.

5. **Serfrøði innan samfelagsfrøði, búskap og planlegging**, sum kann rokna upp á íløgur, útreiðslur, møguleikar og avbjóðingar innan grøna tøkni.

6. **Serfrøði innan sosiologi** sum skilur atburð og lívsstíl hjá fólki og teirra hugburð til átøk í sambandi við veðurlagslógina.

7. **Serfrøði innan planlegging og fyrisiting** við innliti í politisku skipanina og myndugleikar í kommunum og hjá landinum.

8. **Serfrøði innan juridisk øki og stýring**, sum viðvíkja umhvørvi og orku. Henda serfrøði stuðlar upp undir, at vitan sum viðvíkur útláti av veðurlagsgassi verður knýtt til praktiskar avgerðir at røkka málunum í veðurlagslógini, og at nýggjar lógir kunnu vera gagnligar fyri Føroyar, samstundis sum tær halda altjóða skyldur.

9. **Serfrøði innan samskifti og miðling**, m.a. miðlarar, journalistar og lærarar, sum kunnu upplýsa, skapa áhuga, rótfesting og undirtøku millum fólk fyri stóra skiftinum, sum veðurlagslógin leggur upp til.

Afturat øllum hesum eigur føroyska Veðurlagsráðið at hava atlit at hesum viðurskiftum:

- **Serføroysk viðurskifti.** Á grundleggjandi økjum hava Føroyar aðrar umstøður enn stór lond. Tað er tí týdningarmikið, at limir í nýggja Veðurlagsráðnum hava tilknýti, vitan og royndir úr Føroyum sum lítið oyggjasamfelag, so loysnir fáa íblástur frá útlondum uttan at herma beinleiðis, men verða tilpassaðar føroysk viðurskifti.

- **Unga ættarliðið** skal liva við avleiðingunum av avgerðum, sum verða tiknar komandi árini. Tað hevur týdning, at tey ungu sleppa til orðanna, so veðurlagslógin finnur rótfesti hjá unga ættarliðnum.

- **Vinnan innan m.a. fiskarí, orku og flutning** má hoyrast, so tilmæli eru framskygd, samstundis sum tey eru realistisk og fáa rótfesti í vinnuni á ein tilvitaðan og uppbyggjandi hátt.

Við einans 3 limum fer Veðurlagsráðið langt frá at fevna um neyðuga serfrøði. Ráðið eigur tí at hava møguleika og fíggjarligt rúm til at kalla inn serfrøði eftir tørvi.

Tilmæli 5: Lógin eigur at nevna, at Veðurlagsráðið kallar inn serfrøði eftir tørvi.

Torfør byrjan hjá Veðurlagsráðnum

Tað verður ein spennandi og krevjandi uppgáva hjá einum nýggjum Veðurlagsráði at fara undir arbeiðið, sum krevst sambært Veðurlagslógini. Veðurlagsráðið skal geva holl tilmæli til politisku skipanina um stórar langtrøkkandi samfelagsbroytingar, samstundis sum limirnir eru vakthundur fyri landsstýrið og skulu luttaka í almennum kjaki, sum varpar ljós á veðurlagsbroytingar og neyðugar samfelagsbroytingar.

Tað verður týdningarmikið hjá Veðurlagsráðnum at fylgja væl við, hvat rørir seg í samfelagnum og í umheiminum og at hava virknar samskiftispallar á alnótini, sum geva skilagóða almenna kunning og kjak. Ráðið eigur at hava møguleika at skapa tætt samskifti við serfrøði innan ymisk evni, við vitanareindir í Føroyum og uttanlands, sum t.d. Búskaparráðið, Hagstovuna og granskingarstovnar, umframt samskifti við ymiskar samfelagsbólkar og felagsskapir í Føroyum.

At manna Veðurlagsráðið við einans trimum limum, sum sita í fýra ár við skrivstovuhaldi á Umhvørvisstovuni uttan fastan fakligan skrivara er ein byrjan, sum má sigast at vera torfør og óframsøkin.

Tilmæli 6: Lógin eigur at áseta, at Veðurlagsráðið hevur ein fastan fakligan skrivara.

Vinalig heilsan vegna Jarðfeingi

Lis E. Mortensen

Náttúrulandafrøðingur